# Frádrátturin ikki nortin fyribils

**Bárður Nielsen sigur, at hann í verandi støðu hevur sera lítlan hug at nerta við handverkarafrádráttin**

FRÁDRÁTTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*


*Hóast handverkaravinnan hevur ynski um at betra um skattligu korini hjá handverkarum. So er hetta ikki nakað, sum Bárður Nielsen ætlar sær at nerta fyribils*

Í Degi og Viku í farnu viku førdi fomaðurin í Handverkarafelagnum fram, at okkurt mátti gerast, soleiðis at fleiri handverkarar fingust at arbeiða í Føroyum. Hetta tí tað í dag er fíggjarliga væl meira lokkandi hjá hesum at arbeiða uttanlands, tí har fáa teir skattafrádrátt fyri útreiðslur til kost og uppihald.

Her varð nevnt, at eitt hugskot kundi verið, at serligur frádráttur varð latin handverkarum í Føroyum, men hesum vildi landsstýrismaðurin í fíggjarmálum ikki vita av. Ikki minst, tí hann helt, at hetta einans kundi skapa trupulleikar í mun til aðrar fakbólkar her á landi.

## Má fylgja grannunum

Aðra staðni hevur handverkarafrádrátturin til tíðir verið nýttur sum eitt amboð at regulera ferðingarmynstrinum fyri handverkarar. Hetta á tann hátt, at er nógv arbeiði til í landinum, verður frádrátturin lækkaður, so tað skal vera minni lokkandi at søkja arbeiði uttanlands. Hinvegin hevur frádrátturin so verið hækkandi, um lítið av arbeiði hevur verið. Fyri á tann hátt at eggja arbeiðsmegini at gerast meira mobila.

Tað hevur tó skapt trupulleikar, tá frádrátturin er minkaður aftur, og tí er hetta ikki ein skipan, sum verður nýtt serliga aktivt longur. Og Bárður Nielsen heldur á ongan hátt, at hetta er ein skipan, sum í verandi støðu er aktuell í Føroyum.

– Fyrst og fremst, so er ein slíkur frádráttur altíð sera vandamikil at nerta við. Eitt skifti var frádrátturin hjá okkum bara 100 kr. um samdøgrið, men tað forðaði tó ikki monnum í at fara uttanlands. Heldur gjørdist tað so, at hesir skifti statsborgaraskap, so teir t.d. kundu arbeiða í Týskalandið við danska frádráttinum. Tá mistu vit alla skattainntøkuna og so er lítið vunnið, heldur Bárður Nielsen. Tí heldur hann, at tað í hesum er týdningarmikið, at vit hava nakrar satsir, sum eru á leið teir somu, sum teir eru í grannalondunum.

## Trýstið ikki so stórt

Og hann leggur afturat, at hann hóast alt ikki heldur, at trýstið á heimliga arbeiðsmarknaðin er so ovurhonds stórt.

– Sjálvandi skulu vit fylgja við støðuni. Men enn tykist hetta ikki hava skapt nakrar veruligar fløskuhálsar. Hetta hevur tað almenna eisini sæð aftur í teimum tilboðum, sum eru givin. Hesi tykjast enn at svara til metingarnar, og tí haldi eg ikki, at prísurin enn er trýstur nakað serligt. Vísir tað seg, at trýstið verður ov ógvusligt, so kann tað sjálvandi koma upp á tal at gera broytingar. Men í prinsippinum dámar mær lítið at skula nerta nakað í hesum, staðfestir Bárður Nielsen at enda.

# Ferðast nógv til Danmarkar

**Ikki færri enn 392 ferðir settust flogfør á flogvøllin í Vágum í januar mánaði**

FLOGFERÐSLA
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Vøksturin í ferðafólkatalinum í januar mánaði var 11,3%. Í alt fóru 11.204 ferðafólk um flogvøllin hendan mánaðin. Í fjør var talið 10.069.

Serliga er tað á Danmarkarrutunum, at vøksturin hevur verið stórur. Lutfalsliga er vøksturin til Íslands tó mest – heili 66,7%. Men her skal so hava í huga, at talið av ferðandi nú er komið upp á 787 ferðafólk. Hinvegin hevur talan verið um lutfalsliga stóra afturgongd á rutunum til Noreg og Stórabretlands.

Stóra ferðafólkatalið hevur eisini avleitt fleiri komur og fráferðir um flogvøllin. Í januar mánaði var talið av flogførum, sum komu og fóru, 392. Í januar í fjør var hetta talið 332.

Talan hevur annars verið um sera støðugan vøkstur í ferðafólkatalinum um flogvøllin seinnu árini. Í 1997 var samlaða talið av ferðafólkum góð 117.000 um árið. Í fjør kom hetta talið fyri fyrstu ferð upp um 180.000. Heilt neyvt var talið á ferðandi tá 181.305.


*Vøksturin í ferðafólkatali um flogvøllin tykist enn at halda fram*

YARIS TOYOTA



Kom og síggj nýggja ættarliðið av Yaris…

**Í sambandið við frumsýningina av Yaris hava vit opið hús í Hoyvík, leygardagin 4. februar millum kl. 10.00 og 16.00**

Tann spildur nýggi Yaris hevur enn meira pláss, nýggja innrætting og betraðar koyrieginleikar. Hann er nú bæði longri og breiðari enn undangongubilurin. Kabinan er vorðin enn meira bjálvað soleiðis, at lítli, men stóri bilurin, kennist púra kvirrur at ferðast í.

Toyota Yaris fæst í trimum útgávum: Terra, Luna og Sol – alt eftir hvussu nógva eykaútgerð ein ynskir.

Prísir úr kr. 154.600,-

TEAM85

Vegurin Langi · Hoyvík · Tel. 353040 · Fax 353041
rs@reyniservice.fo · www.reyniservice.fo

REYNI SERVICE P/F